# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tillukku og vælkomin heim Linda

Neyvan nakrantíð hava so nógvir føroyingar fylgt við í eini sjónvarpssending sum fríggjakvøldið, tá Linda Andrews vann X Factor kappingina hjá DR. Hetta var undirhald fyri allar pengarnar. Líka mikið hvat vit so enn halda um danskar undirhaldssendingar, musikalska støðið ol., so hevur fólkið tikið slíka sending til sín – eisini sum eitt andarúm frá vanliga gerandisdegnum.

Linda, sum sang seg til sigurs í eini sending í donskum sjónvarpi, ið hevur sett hyggjaramet, er og verður tað helst leingi aftrat, ein kempureklama fyri Føroyar og føroyingar. So kunnu vit tosa um kulturimperialismu og døgnflugur. Tað er sjálvandi eisini ein partur av einum og hvørjum kjaki. Men fyri fólkið, fyri fjøldina og eisini fyri mong av teimum musikglaðu er Linda veruliga ein lýsandi bjørt og fjálgandi stjørna, sum hevur skapt virðing og áhuga rundan um seg sjálva men eisini fyri okkum føroyingum sum heild.

Fáur hevur ivast í hennara songligu dygdum, og aftur og aftur hava vit hoyrt frá bæði leikfólki og professionellum, at røddin er eminent. Sjálvandi skulu vit í fyrstu atløgu ikki taka hetta fyri meira enn tað er, nevniliga ein undirhaldssending, sum tó eisini kann vera grundarlag undir nøkrum meira. Undirhald kann vera so nógv, og at so mong seta tíð av til at fylgja við gjøgnum fleiri mánaðir, bendir á, at her hava stigtakararnir rakt í blett. Her er talan um professionelt sjónvarp, og at føroyskur produsari hevur staðið á odda fyri sendingini, ger hana ikki verri, tvørturímóti. Nú vilja tað helst vera tey, sum halda, at hetta stinkar av sjálvsgleði og tjóðskaparligum undirtónum. Og hvat so! Hví skulu vit ikki gleðast um slíkar løtur, tá ein av okkara stendur seg so væl í stórari fólksligari kapping. Við allari respekt fyri tí professionella, so latið okkum ikki gloyma tað fólksliga. Og er tað ikki eisini oftani so, at tað professionella nettupp sprettur úr tí fólksliga! Tað eina nýtist í hvussu er ikki at útiloka hitt.

Og hví ikki brúka slíkt høvi til at gera vart við okkum – hesa lítlu tjóðina við einans 48.000 íbúgvum, ið kann fostra fólk, ið koma langt og eru góðir ambasssadørar fyri okkara land! Linda hevur við sínum framførslum, síni góðu og glaðu rødd, síni jaligu og klóku medferð uttan iva givið Føroyum túsund ferðir tað, sum milliónir av marknaðarkrónum annars vildu kravt.

Lat okkum gleðast saman við Lindu. Lat okkum bjóða henni hjartaliga vælkomnari heimaftur.
Og lat okkum øll – við hesi songkvinnu sum ein av flaggberarum okkara – raðfesta tónleikin og tónleikaumhvørvini hægri – líka mikið, hvat slag av tónleiki vit tosa um. Latið okkum gera tónleikin, amatørtónleikin eins væl og tann professionella til nakað náttúrligt og gott í okkara samfelagsmenning. Hvør veit, kanska Linda við sínum framførslum hevur fingið okkurt tónleikafræið at spíra.

**Sosialurin**

## Nakrar viðmerkingar til Magna Laksáfoss

**JÓANNES EIDESGAARD**
landsstýrismaður



Nú Magni Laksáfoss rættiliga hevur sett kanónina ímóti mær og Fíggjarmálaráðnum og ikki minst ímóti Javnaðarflokkinum, kenni eg meg noyddan at koma við nøkrum viðmerkingum.

Tað er rætt, at Magni Laksáfoss hevur nógv hugskot. Trupulleikin plagar at vera, at tey ikki altíð eru so væl gjøgnumhugsaði. Støðan í dag er so mikið álvarsom, at vit kunnu ikki stýra eftir teimum fyrstu og bestu hugskotunum, sum vit fáa.

Í Fíggjarmálaráðnum arbeiða vit út frá veruleikanum. Tey átøk, sum vit seta á dagsskránna, byggja á ta vitan, sum okkara serfrøðingar koma við. Tað er kanska ikki so smart, sum at fáa okkurt skjótt hugskot, og so krevja tað gjøgnumført her og nú. Men tað hevur týdning – bæði at taka eina sníkjandi kreppu í álvara og samstundis ikki at eggja til eina enn verri kreppu.

Bankapakkarnir vóru eitt felags átak, sum varð veitt fíggjarkervinum í øllum ríkinum. Vit arbeiða nú við eini meting av, um kundarnir hjá peningaststovnunum síggja hesa almennu hjálp aftur. Sjálvur ivist eg í tí, men vit vilja hava grundleggjandi vitanina í lagi.

Nýggju tølini fyri føroyska búskapin koma í hesi vikuni. Tá skulu vit eisini meta um, hvørji politisk átøk eiga at verða gjørd. Búskaparátøk skulu venda rætt og síggjast í størri samanhangi enn, hvør fær eitt hugskot her ella har.

At taka stig til at minka um risahallið á fíggjarlógini er ein politisk avbjóðing av teimum heilt stóru. Eg havi havt fund við landsstýrið - eisini sambandsumboðini - um ymisk uppskot, sum eisini skulu koma strukturella hallinum til lívs. Fíggjarmálaráðið hevur gjørt eina røð av uppskotum, alt frá at taka burtur stuðulsskipanir til bygnaðarligar broytingar. Alt uppskot, sum tú ivaleyst kennir til frá tínari tíð á Argjum. Hesi uppskot eru latin landsstýrisfólkunum. Men uppskotini verða verandi uppskot, um ikki undirtøka fæst fyri teimum, og tað er júst har, at hundurin er grivin.

Tað nyttar lítið, at eg standi einsamallur í fjølmiðlunum og rópi upp um landbúnaðarstudningar, fiskimannafrádrátt, tilfeingisgjald, mvg-stuðul ella tollfrítt tubbakk, um eingin ella ov fá í samgonguni taka undir við mær. Skal eg havi verulig úrslit, so fái eg tey bert, um flokkarnir – allir tríggir – taka undir við at fremja nøkur av hesum tiltøkum - tað er bara ein politisk premissa.

Meðan arbeitt verður við hesum viðurskiftum, so haldi eg, at tað er eisini skilagott at fáa meira skil á nøkur átrokandi viðurskiftum. Eitt er mannagongdin til eina fíggjarlóg, hitt er eftirlit við, at játtanirnar verða hildnar og í triðja lagi eftirlit við búskapinum hjá kommununum.

Tað kann væl vera, at vit ikki í hesum samgonguskeiðinum fáa rós fyri stór avlop á fíggjarlógini, men so kundi tað klætt okkum at hava fingið stýr á fíggjarligu viðurskiftunum bæði hjá okkum sjálvum og hjá kommunum.

Hetta er ein trupul tíð fyri okkum øll - eisini okkum politikkarar. Eg havi roynt verri tíðir fyrr og veit, hvat krevst politiskt. Tá vóru vit meira ella minni noydd at hava eina politiska styrki til at taka ópopulerar avgerðir. Men kanska er politiski ryggurin hjá fleiri okkara ikki nóg fattur enn. Men uttan mun til alt hetta, má tað standa okkum øllum púra greitt, at vit mugu taka tøkini saman, og minst av øllum hava vit brúk fyri politiskum bakbitum.

## Smyril Line havt sína besta søludag í ár

**FERÐING**
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Um tað er útferðarlongsulin ella tilboðið um 10% í avsláttri, er ringt at spáa um, men sølan av ferðaseðlum við Norrønu hevur gingið óvanliga væl seinastu dagarnar, og í dag bar av

Smyril Line gevur 10% í avsláttri av ferðaseðlunum í summarsiglingini við Norrønu, um keypt verður áðrenn 1. apríl, og nógv fólk hava sambært Jákup Sverra Kass, sølustjóra á Smyril Line, nýtt høvið at keypa ferðaseðilin til summarfrítíðina.

- Átakið hevur hildnast sera væl, vit hava í dag havt okkara best søludag higartil í ár. Av tí at linjurnar hava gingið heitar í dag, hava vit gjørt av at hava opið til kl 22 í morgin, sigur Jákup Sverri Kass.

Sølan av ferðaseðlum hevur gingið avbera væl í ár, men við tveimum fráferðum millum Føroyar og Danmark í summarsiglingini, eru tvífalt so nógvir ferðaseðlar til sølu. Tí varð avgjørt at veita 10% í avsláttri, til tey sum keyptu tíðliga. Úrslitið hevur verið stak væleydnað.

- Vit hava góðar vónir til árið. Tú kanst kanska siga, at hetta er okkara máti at geva nakað aftur til føroyingar. Vit hava eisini gjørt ferðaseðlarnar fyri mánadagsfráferðina nakað bíligari, so her er eisini ein avsláttur at heinta, sigur Jákup Sverri Kass, sølu- og marknaðarstjóri á Smyril Line.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.